**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 20.12.17**

**Á fundi:** Erika Anne Hayfield, lektari, forkvinna
Ingmar Berg Mikkelsen, lesandi, næstformaður
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari
Ingi Jacobsen, lesandi
Emil Hermansen, lesandi (ikki møttur)
Árni Johan Petersen
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Broytingar í Lestrarráðnum í 2018:** Erika fer frá sum forkvinna í Lestrarráðnum tíðarskeiðið er runnið. Árni Jóhan Petersen verður formaður í Lestrarráðnum. Karin Jóhannesardóttir er nýggj lesandi í Lestrarráðnum, kemur inn fyri Inga Jacobsen sum gevst í Lestrarráðnum.

2 **Lesihøli til lesandi (flutt frá seinasta fundi):** Heitt var á Lestrarráðið at fáa eitt høli til lesandi at arbeiða í bólkum og annað sosialt á Søgu og Samfelagsdeildini. Erika kunnar Dekanin um hetta.

3 **Góðska á undirvísing (flutt frá seinasta fundi**: Tey lesandi eftirlýstu, at pedagogiska tilgongdin verður styrkt. Tey vórðu kunnað um, at Setrið ikki hevur universitetspedagogikum og at arbeitt verður við tí. Lestrarráðið er samt um, at tað er umráðandi, at eitt pedagogikum tilboð verður boðið starvsfólkum. Avtalað var, at taka málið upp aftur á næsta Lestrarráðsfundi. Dekanurin far boð um hetta.

4. **Skeiðslýsing:** 8713.18 Grundskeið i hagfrøði er góðkent á Masterlæruni á listanum, undangóðkenning fyri skeið.

5. **Góðskrivingar:**

***N.N. Masterlæra:*** Verður sent aftur til útbúgvingarleiðara. Nakað ógreitt, hvat sókt verður um.

***N.N. Masterlæra****:*
Umsókn um undangóðkenning 7,5 ECTS Contract law er góðkend.
Umsókn um undangóðkenning, Kommunen 7,5 ECTS er góðkend.
Umsókn um undangóðkenning 5 ECTS viðgerð av data. Skeiðslýsing vantar vísa til Beintu í Jákupsstovu.

***N.N. Masterlæra,*** umsókn um undangóðkenning ikki neyðugt tí skeiðið er góðkent.

6. **Skeiðslýsing í Búskaparfrøði:** Niðurstøðan var at próvtøkuháttur fyri fakini Marknaðarføring og Organisatiónsgreining verður orðað soleiðis:
   Munnlig framløga við útgangsstøði í einari tíðar- og evnisbundnari heimauppgávu à 15 síður. (10 ECTS)
   Munnlig framløga við útgangsstøði í einari tíðar- og evnisbundnari heimauppgávu à 10 síður. (7,5 ECTS)

7. **Ymiskt:**

   Vegna sparingar verða valfakini, Almennur Etikkur og Logikkur ikki bjóðað út várið 2017.